Kjak

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður

Sakligt svar og einki álop á tænastumenn

Í lesarabrævi í Dimmalætting tann 1. apríl 2011 leggur skilamaðurin Páll Poulsen meg undir at hava framt eitt ófantaligt álop á tænastumenn landsins í tíðindasendingini í útvarpinum mikukvøldið 30. mars.

Millum annað skal eg hava slongt út ein pástand, um at fíggjarkarmarnir fara at spreingjast næstu árini, tí tænastumenn krevja eina so ófatiliga høga upphædd í eftirløn. So skal eg eisini hava sagt, at líkindi eru fyri, at tænastumenn liva leingi, og at tað eisini er ein vaksandi trupulleiki.

Nei, onki av hasum havi eg sagt og kundi eg heldur ikki funnið uppá at sagt slíkt. Eg varð biðin at svara tveimum spurningum. Ein um, hvussu nógv landið rindar til tænastumannalønir og ein, hvønn týdning tað hevur at skráseta tær skyldur, sum landið hevur mótvegis hesum bólki av borgarum.

Hesum báðum spurningum svaraði eg soleiðis:

"Tað verður sjálvandi gott, at tað verður skrásett, so man sær, hvørjar skyldur landskassin fær komandi árini. Men tað er soleiðis í dag, at landskassin rindar umleið 100 miljónir krónur árliga til tænastumannaeftirlønir, og tað vísir seg í framskrivingunum, at tað fer at veksa í 10 ár framyvir, soleiðis at vit tátta í 200 miljónum krónunum um 10 ár. Men av ti, at man gavst í stóran mun at seta tænastumenn fyri nøkrum árum síðani, so fer talið á tænastumannaeftirlønum eisini at minka so líðandi eftir 2020."

Sp.: Er tað upp á tíðina, at vit fáa skrásett hesar tænastumenninar, tí hetta eru hóast alt stórar upphæddir?

"Ja tað er sjálvandi skilagott at fáa tað skrásett, tí tað eru rímiliga stórar upphæddir, tá tað er talan um nógvar persónar, soleiðis, at man eisini veit framyvir, hvat tað er fyri skyldur landskassin hevur."

Hesi vóru míni orð og eg dugi ikki at hoyra, at hetta á nakran hátt er nakað álop á tænastumenn landsins. Hvat annað varð sagt, kann eg ikki taka ábyrgdina av.

Eg varð spurdur tveir einfaldar spurningar og svaraði so sakliga, sum eg kundi.

Gunvá við Keldu
Forkvinna í KSF

KSF hevur mælt til sjálvbodna samanlegging við eini freist

Í Sosialinum mánadagin 28. mars verður løgmaður endurgivin fyri at siga at hann eftir at hava hoyrt kommunufeløgini er komin til ta niðurstøðu, at næstan tveir triðingar av føroysku kommununum bíða eftir at verða lagdar saman í níggju stórar kommunalar eindir. Sambært løgmanni, bíða kommunurnar bert eftir at landspolitikarin tekur støðu. Grundað á hetta hevur Løgmaður nú tikið avgerðina í egnar hendir, og avgjørt at leggja kommunurnar saman við lóg.

Sannlíkt er, at Løgmaður her sipar til fundin, 22. mars millum politiska fylgibólkin og kommunufeløgini, tá ið hann sigur seg hava hoyrt kommunurnar.

Til hetta er at viðmerkja, at KSF hvørki á fundinum 22. mars, ella á fundum higartil, ímillum kommunufeløgini og politiska fylgibólkin, hevur givið til kennar, at kommunurnar vilja hava løgmann at taka eina avgerð um at leggja kommunurnar saman við lóg.

Seinasta almenna fráboðan KSF's um hetta stórmál, varð gjørd á felagsfundi millum býráðslimirnar í limakommunum 26. Februar 2010, Klaksvíksskjalið, har niðurstøðan var, at:

- kommunusamanlegging skal fara fram sjálvboðin
- tó skal freist setast á eitt evsta mark, har kommunur skulu hava skipað seg í burðardyggar eindir

Allar kommunurnar í KSF hava hinvegin givið til kennar, at tær taka undir við, at farið verður undir eina fólksliga tilgongd at leggja kommunur saman í størri og burðardyggari eindir. At Løgmaður einsamallur nú tekur avgerð ber ikki boð um eina fólksliga tilgongd.

Absalon í Buð

Hvannasund hevur goldið fyri tunnilin

Fólkavaldi bygdaráðslimur, Niels Olaf Eyvindsson, kemur í Sosialinum við eini lodrættari lygn. Sbr. lóg frá apríl 1955 hava Hvannasunds og Klaksvíkar kommuna - eins og Hvalbiar- og Tvøroyar kommuna, goldið sín lógarásetta part av tunlunum - gjørdir vóru í sekstiárunum.

Parturin hjá kommununum í Norðoyggjum var ca. 15% av samlaðu íløguni.

Rokningin til Hvannasunds kommunu var 1967, 220% av skattaálíkningini tað árið.

Tunellmálið verður ikki loyst við at kasta ósannindir eftir hvørjum øðrum.

Fakta er. Báðir partar, mugu liva við nøkrum óbrúkiligum bergholum.

Klaksvík - Norðtoftir, roynir at slúka 11-1200 akførum um døgnið.

Hvalba - Tvøroyri, roynir at slúka 6-700 akførum um døgnið.

Trupulleikin er at egocentrisku miðstaðarpolitikarnir skíta á trupulleikan. Í teirra hugaheimi er tað ein býur í Kina, at játta pening til slíkar verkætlanar.

Kitty May Ellefsen

Nei til brandskatting

- og knokkróting! Nei til rentuútreiðslur sum fara at binda bæði okkar ættarlið og næsta niður.

Gott at Fólkaflokkurin heldur seg til røtur sínar og berjist fyri borgararnar og vinnulívinum móti almenna veldinum, sum í veruleikanum er ómetteligt.

Tað er so púra beint at seta sum krav, at nú veksur tað almenna ikki meira, men nú verður tað privata nýtslan og skapan arbeiðsplássum í privata sektorinum, sum stendur fyri tørni.

Við samanlegging av ráðum og samskipan og rationalisering av undirliggjandi stovnum kann lættliga fáast tann sparing, sum skal til fyri at sleppa borgarunum og vinnuni undan ætlaðu knokkroytingini av teimum.

Alternativið til brandskatting og stagnatión eru skilagóðir, stabilir og góðir karmar, ið virka fyri øktari privatari nýtslu og fyri at skapa nýggj arbeiðspláss í privatu vinnuni.